# Køkshjálp til dagstovnaøkið

Søkt verður eftir avloysara fyri køkshjálpina á dagstovnaøkinum hjá Vestmanna Kommunu at byrja skjótast til ber.
Setanin endar 13. juli 2018.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:
- gera millummála
- standa fyri matinnkeypi
- halda køkin og onnur tilhoyrandi hølir

Køkshjálpin kemur partvíst at arbeiða sjálvstøðugt, og skal tí duga at leggja sín egna arbeiðsdag til rættis.
Tann setti skal hava koyrikort til persónbil.
Tilvísing er til leiðaran fyri dagstovnaøkið.

Talan er um hálvtíðarstarv, 20 tímar um vikuna, og lønin verður sambært sáttmála ímillum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Morið A. O. Gardy, leiðara, tlf. 770 134.

Umsóknir skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. mai 2017 kl. 12.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**
**vestmanna@vestmanna.fo**